# Vinnulívið í fremstu røð

**Tað verður vinnulív í fremstu røð við treysti, trygd og trivna komandi fýra árini, sambært Fólkaflokkinum, sum hevur almannakunngjørt valskránna til løgtingsvalið, har endaligi sjálvsstýrisspurningurin er útsettur**

LØGTINGSVAL
*Heri á Rògvi*



*Tað var gott lag á monnum, tá Fólkaflokkurin boðaði frá sínari valskrá til løgtingsvalið 30. apríl. Treysti, trygd og trivni eru slagorðini.*

*Mynd: Jens Kristian Vang.*

–Vit skulu føra politikk á tryggan grundarlagið. Soleiðis ljóðaði fyrstu orðini frá Anfinni Kallsberg, løgmaður og formaður í Fólkaflokkinum, tá Fólkaflokkurin hósmorgunin opnaði upp fyri valskránna til løgtingsvalið, sum flestum kunnugt verður 30. apríl.

Fólkaflokkurin hevur sett saman ein val skrídda valskrá til løgtingsvalið, sum hevur fingið herrópið Treysti, trygd og trivni. Á tíðindafundinum vóru flestu løgtings- og landsstýrismenn Fólkafloksins, og hýrurin var rættiliga góður.

Í valskránna verður raðfest ovarliga á nógvum økjum. Vinnan, mentanin, almenna- og heilsuøki og fleiri enn skulu øll rokna við at verða raðfest ovarliga, um Fólkaflokkurin verður sitandi við ræðið komandi fýra árini.

Fólkaflokkurin er kendur fyri sín vinnulívspolitikk, og hetta veðrur eisini raðfest ógvuliga ovarliga.

–Vit skulu hava eina góða og sjálvberandi vinnu, tí vinnulívið er grundarlagið undir samfelagnum, varð sagt á tíðindafundinum.

Lagt varð upp til, at meira skal verað gjørt við at lurta eftir vinnuni sjálvari, tí tað er vinnan sjálv, ið kennir egnan tørv og førleika. Eisini skattaviðurskiftini skulu betrast. Tann einstaki borgarin skal merkja betri sømdir og lægri skattatrýst.

Nógv varð gjørt burturúr at tosa um seinastu fýra, ið Fólkaflokkurin heldur hava verið ógvuliga gevandi fyri føroyska búskapin og føroyska samfelagið.

### Sjálvstýri útsett

–Vit halda fram á somu leið, segði Anfinn Kallsberg, tá vit spurdu hann eftir, hvat Fólkaflokkurin ynskti á sjálvsstýrisleið, tá hetta ikki fær so nógva umrøðu í valskrá floksins.

Í Føroyum skulu føroyingar ráða, ljóðar tað í einum av herrópum Fólkafloksins, men annars var ikki nógv nýtt undir sólini, sum tikið varð til. Fólkaflokkurin heldur seg til gjørdar avtalur, og arbeitt verður framímóti sjálvsstýri eftir gjørdum avtalum.

–Spurningurin um endaligt loysing ella samband er útsettur tey næstu fýra árini, sigur Anfinn Kallsberg, sum heldur Fólkaflokkin hava nógvar samgongumøguleikar at velja ímillum eftir valið.

Vegna ov stutt skotbrá, varð tað ikki møguligt at fáa alt við frá tíðindafundinum, men meira verður at lesa í morgin.






## Aðalfundurin hjá Heimahjálparafelagnum

AÐALFUNDUR
*Ingrid Bjarnastein*

Leygardagin hevði Heimahjálparafelagið aðalfund. Á fundinum var bæði formans- og nevndarval, har øll nevndin varð afturvald. Nevndin skipaði seg í mikudagin, og sær soleiðis út:

Ása Olsen, Tórshavn, formaður
Elsa B. Joensen, Klaksvík, næstformaður
Hildigarð Djurhuus, Fuglafjørður, skrivari
Hanna West, Hvalba, kassameistari
Sunrid Thorsteinsson, Vágur, nevndarlimur
Jórun Jacobsen, Miðvágur, nevndarlimur
Hildur Johannesen, Tórshavn, nevndarlimur
Judith Árnastein, Tórshavn, eykalimur
Selma Gullaksen, Klaksvík, eykalimur

Til viðgerar á aðalfundinum var millum annað verkfallsgrunnurin. Tað hevur verið soleiðis, at eitt stovnsfæ skal uppnáast áðrenn peningur kann takast úr grunninum, men hetta er nú avtikið, soleiðis, at um kreppa kemur, so er grunnurin klárur at taka av.

– Ongi mótuppskot eru ímóti nevndini, og hetta taka vit avgjørt, sum eina álitisváttan, sigur Ása Olsen, formaður í Heimahjálparafelagnum.

– Tá felagið varð stovnað var tað fíggjarliga illa fyri, men nú eru vit komin fyri okkum. Vit hava fingið eina uppskúling á Tvøroyri, og hetta ger tað møguligt hjá heimahjálparum at fara á skúla við løn.

Til aðalfundin vóru eini 150 av 400 aktivum limum møttir upp.



# Landsstýrið yvirsær lærararnar

**– Vit hava fyri neyðini at fáa eitt samskifti í lag við Landsstýrið, men teir yvirsíggja okkum bara. Hetta sigur Terje Kjærbo, álitismaður hjá lærarunum í Skúlanum við Ósánna í Klaksvík.**

ÓSEMJA
*Ragnhild Ellingsgaard*



*Terje Kjærbo hevur í fleiri ár starvast sum lærari á Skúlanum við Ósánna*

**Klaksvík, Sosialurin:** Blokadan hjá Føroya Lærarafelag vísir nú eisini sína ávirkan í Klaksvík. Skúlarnir hava brúkt nærum alt tilfarið, sum teir hava átt á goymslu, og blokadan forðar lærarunum í at fara út at keypa nýtt tilfar.

### Kenna sviðan

Skúlarnir í Klaksvík byrja so smátt eisini at kenna sviðan av blokaduni hjá Føroya Lærarafelag

– Vit hava roynt at fingið eitt samskifti í lag við Landsstýrið, men teir yvirsíggja okkum bara, sigur Terje Kjærbo, álitismaður hjá lærarunum í Skúlanum við Ósánna.

Tann 20. februar varð nógv umtalaða blokadan víðkað til eisini at umfata savnsrøkt, og hetta førdi við sær, at lærararnir ikki longur skulu hava røktina av serstovum um hendur.

– Hetta ávirkar serliga tær kreativu lærugreinirnar sum smíð, handarbeiði, evning og køk. Higartil hava vit klárað okkum við tilfari, sum hevur ligið á goymslu, men tað er so smátt við at verða uppi nú, greiðir Terje frá.

– Hetta merkist eisini aftur í undirvísingini. Tí tá lærararnir ikki fáa gjørt teirra arbeiði til lítar, so trívast teir ikki. Og tá vit ikki trívast, so trívast næmingarnir heldur ikki, sigur Terje, sum heldur, at hetta er ein keðilig støða, sum fólkaskúlarnir nú eru komnir í.

– Í veruleikanum er hetta ein trupuleiki, sum Landsstýrið saman við kommununum skuldi havt loyst fyri langari tíð síðan, sigur Terje.

### Foreldur við

– Hetta boðar als ikki frá góðum, nú skúlarnir fyri stuttum gjørdust føroyskt málsøki, heldur enn danskt. Men sum lærari ert tú noyddur at síggja ljóst uppá framtíðina, og tað royna vit eisini eftir førimuni at gera, sigur Terje Kjærbo.



*Terje Kjærbo heldur, at foreldrini eisini skulu blanda seg uppí málið*

Tó hevði hann fegin viljað, at foreldrini byrjaðu at blanda seg uppí málið. Hetta hevði verið við til at lagt eitt størri trýst á, og kundi tískil skunda undir eina møguliga loysn.

– Hetta er jú teirra egnu børn, stríðið gongur útyvir. Tí skuldu tey eisini havt áhuga í at loyst málið skjótast gjørligt, sigur Terje.

### Stríð um samsýning

Orsøkin til hesa blokadu er eitt drúgt stríð, sum komst av, at Føroya Lærarafelag vildi hava eina samsýning fyri at røkja søvnini.

Orsøkin til stríðið er eitt álit, sum ein arbeiðsbólkur mannaður av umboðum fyri Føroya Lærarafelag, Mentamálastýrinum og kommununum kring landið, hevur gjørt, um hvør skal hava ábyrgdina av søvnunum.

Í hesum áliti stóð millum annað, at lærarar í Føroyum skulu hava eina samsýning fyri at røkja og keypa inn til søvnini.

Men síðani er komið fram, at kommunurnar als ikki vilja góðtaka, at tær eiga ábyrgdina av søvnunum.

Tær stóru kommunurnar vilja fegnar geva eina samsýning fyri savnsrøktina, men bert um tær fáa peningin endurgoldnan frá landinum. Tær smærru kommurnar vilja hinvegin als ikki góðtaka, at lærarar skulu hava nakra samsýning fyri ábyrgdina, tá tær meta, at hetta heldur skal skiljast sum ein partur av teirra arbeiði.

Hetta hevur so ført við sær, at Lærarafelagið lýsti blokadu. Fyrst mótvegis próvtøkuuppgávunum, og síðani eisini savnsrøktini á skúlunum.

# Bátur sakk norðan úr Viðoynni

**Áttamannafarið Kyrrasund hjá Sylvan Jakobsen úr Klaksvík sakk norðan fyri Viðoynna seinnapartin í gjár**

ÓHAPP
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík, Sosialurin:** Sylvan greiðir frá, at hann hevði fiskað allan dagin og hevði fingið eini trý túsund pund, tá hann gjørdi av at fara til hús.

– Eg hugdi niður í maskinuna, sum eg altíð plagi, áðrenn eg koyrdi lúkuna aftur. Tá sá eg, at nógvur sjógvur var komin í maskinrúmið, greiðir Sylvan frá.

Lenspumpan hevði sligið frá, og hon vildi ikki starta aftur. Tað var orsøkin til, at so nógvur sjógvur var komin í maskinrúmið. Sylvan hevði eina aðra pumpu eisini, men tað var ikki nóg mikið. So hann royndi eisini at pumpa við hond.

– Eg sá tó, at tað fór ikki at ganga, so eg rópti á Tjaldrið og Brimil, men av tí at, eg var staddur norðanfyri Viðoynna og teir í Leirvíksfirði, so hoyrdi teir ikki VHF–in. Men ein annar Klaksvíksbátur var nær við, so eg rópti á teir og bað um hjálp, sigur Sylvan.

Hin báturin var Elin, sum Karl Gudmund Henriksen úr Klaksvík eigur. Hann kom til, og tíggju minuttir eftir, at Sylvan var komin umborð á Elin, sakk Kyrrasund.

– Tað gekk ikki meir enn ein tími frá tí at eg varnaðist at báturin lak, til hann var sokkin, sigur Sylvan.

– Tað var helst tí, at tað var nógvur fiskur í bátinum, so hann var tungur.

– Men eg visti alla tíðina, at tað var ikki vandi á ferð hjá mær, tí at bátur var í nánd, men eg varð sjálvandi sera kløkkur. Og eg var illa fyri, tá eg kom til hús aftur.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at Sylvan Jakobsen missir ein bát.

– Eg eri sera forharmaður um hetta. At tað skal blíva við. Eg veit ikki, hvat hetta er fyri nakað. Man skuldi trúð, at tað er rúnargandur, sigur ein skelkaður Sylvan at enda.

## Skúlastýrið ikki tikið støðu

**– Vit hava ikki havt fund enn, so vit hava heldur ikki umrøtt málið, sigur Óluva Klettskarð, formaður í Skúlastýrinum í Skúlanum við Ósánna í Klaksvík.**

ÓSEMJA
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík, Sosialurin:** – Vit skulu hava fund eftir páskir, og tá verður blokadan hjá Lærarafelagnum eisini á skránni, sigur Óluva Klettskarð.

– Vit hoyra ikki nógv frá ónøgdum foreldrum, men tað er lættari hjá teimum at koma til okkum enn hjá okkum at fara út at leita eftir teimum, heldur Óluva.

Hon sigur eisini, at skúlastýrið er eitt gott forum at umrøða slíkar støður sum hesa, tí at har eru umboð fyri foreldur, lærarar og leiðsluna á skúlanum.

– Hóast umboðið fyri leiðsluna ikki hevur atkvøðurætt, so kann viðkomandi geva okkum eina mynd av støðuni, sum hon er á skúlanum, sigur Óluva Klettskarð, sum vónar, at okkurt áhugavert kemur burtur úr fundinum, sum verður tann 4. apríl.